SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Útboð um ráðgeving í sambandi við nýggja talgilda heilsuskipan

**Útboðsformur**: Rammusáttmáli

**Bólkur**: Tænastusáttmáli

**Veitingarstaður**: Føroyar

**Veitingardagur**: 7. okt. 2024

*Gevið gætur (!) at talan er um rammusáttmála, sum setur karmar og treytir fyri framtíðar keyp av tænastum frá ráðgeva. Rammusáttmálin umfatar tískil prísir, veitingartreytir og onnur viðurskifti, men sjálvt vavið av ráðgevingini kann broytast alt eftir tørvi. Tískil verður avtala so hvørt gjørd við ráðgevan av einstøku veitingunum innanfyri karmarnar av rammusáttmálanum. Við ráðgeva meinast við antin einstakling, ráðgevarafyritøku ella eitt konsortium. Í tilfeldi av einum konsortium, er talan um felags ábyrgd, men tað skal vera ein greið ávísing av høvuðsveitara sum eisini verður sáttmálaábyrgdari.*

## Inngangur

Sum liður í fyrireikingum til at útvega nýggja talgilda heilsuskipan til Føroyar, hevur Føroya Løgting tíðliga í 2024 heimilað landsstýriskvinnuni í Heilsumálum at fara í gongd við at gera kravfesting og útboð av eini nýggjari talgildari heilsuskipan. Sjúkrahúsverkið hevur fingið hetta mandat til, og í samstarvi við aðrar aktørar og áhugapartar innan heilsuøkið í Føroyum, at seta arbeiðið í gongd og harvið eisini hetta útboð.

Í hesum sambandi verður søkt eftir ráðgeva, sum verður við í allari tilgongdini, heilt frá ráðgeving og tilgongdarstýring í sambandi við kravfesting/use cases, útboð og verksetan. Hetta umfatar millum annað dialog við møguligar áhugaðar veitarar um veitan ella veitingar innan talgildar heilsuskipanir. Ráðgevin skal stuðla Sjúkrahúsverkinum í at velja eina loysn, har veitarin við best møguligum førleikum og heildarveiting vinnur veitingina. At enda kemur ráðgevin at ráðgeva innan verksetan av loysnini, og verður sostatt ein gjøgnumgangandi og týðandi partur av arbeiðinum í sambandi við eina nýggja talgilda heilsuskipan. Ráðgevin fær tætt tilknýti til verkætlanarbólkin og programmleiðsluna, har hann luttekur á fundum og verkstovum. Krøv til ráðgevan eru nærri lýst aðrastaðni í skjalinum.


J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Bakgrund

Føroyska sjúkrahúsverkið hevur seinastu mongu árini, saman við kommunulæknum og Apoteksverkinum, nýtt talgildu heilsuskipanina COSMIC. Í 2021 varð sjøtil settur á arbeiðið at fáa Eldraøkið við í samstarvið, eins og tað áhaldandi eisini verður arbeitt við at fáa aðrar partar av heilsuverkinum við, til dømis Gigni. Skipanin verður veitt av Cambio, sum er millum fremstu veitarar í Norðurlondum av loysnum til heilsuverk. Tó so hevur veitarin av COSMIC í 2023 sagt sáttmálan upp, og tí er tørvur á at fáa eina nýggja loysn. Sáttmálin við Cambio gongur út við ársenda 2028. Sjúkrahúsverkið er liðugt við fyrsta stig - eina sokallaða strategifasu, har millum annað arbeitt hevur verður við at lýsa støðuna, sum hon er í dag, yvirskipað hvat man hugsar framatrættað, at greiða strategi og at seta eitt avgerðargrundarlag fyri víðari tilgongd.

## Uppgávan

Høvuðsuppgávan hjá ráðgevanum verður fyrst og fremst at ráðgeva verkætlanarleiðsluni í at útvega og verkseta eina nýggja talgilda heilsanskipan, eina sokallaða heildarloysn.

**Talan er um hesar partsuppgávur:**

- Luttaka á fundum, workshops og líknandi við áhugabólkar innan alt heilsuverkið,
- Gera tørvsgreiningar, kravfesting og útboðsveiting av endaligari loysn,
- Samband og samskifti við møguligar veitarar,
- Hjálpa til við útboði, og val av veitara og loysn,
    - Greining og meting
    - Sáttmálasamráðingar
    - Sáttmálaundurritan
    - Løgfrøði og fíggjarlig ráðgeving
- Ráðgeving innan KT-arkitektur,
- Ráðgeving innan verkætlanarleiðslu & stýring,
- Íverksetan av nýggjari loysn, og
- Stuðla yvirgongdini av nýggjari loysn til rakstur og umsiting.

Meir kunning um verkætlanina kann fáast við at lesa um bakstøðið í viðfestu skjølum (*áður send til Føroysku KT-vinnuna)*, har tað eisini er møguligt at gera egna metan av uppgávuni.


J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Bygnaður

Ráðgevin verður aktivur partur av einum verkætlanarbygnaði. Ráðgevin skal tó tola broytingar í verkætlanarbygnaðinum, tí tað er væl hugsandi, at verkætlanarbygnaðurin verður broyttur eftir útboðið, tá ein framtíðar veitari og loysn er funnin.

## Tíðarætlan

Tabellin niðanfyri vísir eina simplifiseraða og yvirskipaða tíðarætlan yvir, nær tørvsgreiningar og kravfesting, útboð og val av veitara og loysn væntast liðugt, umframt eitt boð uppá eina tíðarlinju til verksetan. Fyrivarni skal takast fyri broytingum, til dømis seinkingum ella líknandi í verkætlanini.




## Krøv og ynskir til ráðgevan

Yvirskipað sæð ynskir Sjúkrahúsverkið ein ráðgeva við hollum royndum og skjalfestum førleikum innan verksetan av samfelagskritiskum KT-loysnum, sum ein talgild heilsuskipan jú er.

Starvsfólk hjá ráðgevanum skal hava:

- konkretar royndir við ráðgeving av keypi og íverksetan av sjúklingajournalloysnum og talgilding innan heilsuverk,
- innliti í heilsufakligar arbeiðsgongdir,
- vitan um veitaralandslagið innan sjúklingajournalloysnir,
- royndir við at gjøgnumføra líknandi verkætlanir innan eitt heilsuverk; her er talan um programmleiðslu, tørvslýsingar & kravfesting og stýring, umframt at hava starvsfólk við heilsufakligari bakgrund, eitt nú læknar ella sjúkrarøktarfrøðingar,

- førleikar innan útboðsveiting, fíggjarlig viðurskifti, heilsu KT-arkitektur, sáttmálasamráðing, og verkætlanarleiðslu & stýring í sambandi við verksetan av KT-skipanum.

Ráðgevin skal hava møguleika at veita starvsfólk, sum hava førleikar og royndir innan økið, um eitt nú sjúka ella annað slag av mannfalli skuldi komið fyri.

## Krav til tilboð

Tað er krav, at tilboðið hevur fylgjandi:

- Navn og CV hjá starvsfólki hjá ráðgevanum, ið hevur høvuðsábyrgd av uppgávuni,
- Navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku,
- Prísur pr. tíma uttan MVG,
- Frágreiðing, um hvussu krøv og ynski til ráðgevan, nevnd omanfyri, verða lokin. Um talan er um fyritøku, ið ynskir at gagnnýta fleiri persónar, so skal greiðast frá, hvørjir persónar luttaka í arbeiðinum, og hvørjar førleikar hesir hava (upplýs í mesta lagi tríggjar aðrar persónar aftrat tí, ið hevur høvuðsábyrgdina),
- Frágreiðing um aðrar viðkomandi útbúgvingar, vitan og royndir, og
- Hvørjar viðkomandi kundar ráðgevin hevur havt, og hvørjar viðkomandi uppgávur ráðgevin hevur loyst (upplýs í mesta lagi tveir).

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Tíðarfreistir og ábyrgd

Spurningar til útboðstilfarið og uppgávuna skulu stílast til Annfinn Thomsen á fartelefon +298 783 700 ella umvegis teldupostin annfinn@ls.fo. Allir spurningar skulu sendast inn skrivliga innan mánadagin tann 30. sep. 2024, kl. 12:00. Allir spurningar verða kunngjørdir dulnevndir á Keypsportalinum. Miðja verður eftir at spurningar verða svaraðir so hvørt, tó í seinasta lagi 3. okt. 2024.

Tilboð skulu latast inn umvegis teldupost: annfinn@ls.fo, í seinasta lagi hósdagin tann 10. okt. 2024, kl. 12:00. Miðað verður eftir, at sáttmáli er undirskrivaður 16. okt. 2024.

**Tíðarætlan og innlating**

| Dagfesting | Hending | Viðmerking |
|---|---|---|
| **Mánadagin,** 16. sep. 2024 | Kunngjørt á Keypsportalinum. | |
| **Mánadagin,** 30. sep. 2024 | Freist til at seta spurningar um útboðstilfar til Sjúkrahúsverkið. | Spurningar **skulu** verða skrivligir og sendast til Sjúkrahúsverkið, annfinn@ls.fo, viðmerkt: *"Spurningur um útboð til ráðgeving"*.<br><br>Spurningar verða dulnevndir og lagdir á Keypsportalin. |
| **Hósdagin,** 3. okt. 2024 | Skjal við spurningum og svarum verður kunngjørt á Keypsportalinum. | Miðja verður eftir, at spurningar verða svaraðir so hvørt, tó í seinasta lagi 3. okt. 2024. |
| **Hósdagin,** 10. okt. 2024 | **Freistin til at lata inn tilboð.** | Tilboðið skal latast inn umvegis teldupost til annfinn@ls.fo, viðmerkt: "*Tilboð viðvíkjandi ráðgeving til nýggja talgilda heilsuskipan*".<br><br>Gevið gætur (!) at tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd og eru sostatt uppá forhond vrakaði. |
| **Fríggjadagin,** 11. okt. 2024 | Tilboðini verða viðgjørd og vinnarin funnin. Samráðingar um rammusáttmála byrja. | Sjúkrahúsverkið tilskilar sær rætt at venda sær til tilboðsgevararnar við útgreinandi spurningum um tilboðini. |
| **Mikudagin,** 16. okt. 2024 | **Vinnandi tilboð verður kunngjørt.** | |

## Vekting

Sjúkrahúsverkið tilskilar sær rætt, í samráð við ráðgevan, at venda sær til aðrar kundar hjá ráðgevanum fyri at fáa ummæli.

Um Sjúkrahúsverkið og vinnarin av útboðnum ikki kunnu semjast um ein sáttmála, so fær næstur í røðini møguleikan at gera sáttmála. Metir Sjúkrahúsverkið grundarlag vera at gera sáttmála við vinnaran og næsta í røðini, kann hetta eisini koma uppá tal.

Sjúkrahúsverkið tilskilar sær rætt at vraka tilboð, um talan er um persón ella fyritøku, sum Sjúkrahúsverkið av einari ella fleiri eintýddum orsøkum ikki kann góðkenna. Tilboð, ið fáa lægri enn 4 stig í metingini, verða eisini vrakaði.

Øll tilboð fáa stig fyri prís og førleikar, millum 1 og 10 stig hvørt. Tá talan er um prísáseting, fær tilboðið við lægsta tímaprísinum 10 stig, og restin fær so stig í mun til lægsta tímaprís. Um tímaprísurin er lægri enn 850 kr./tíman uttan MVG, verður hann settur til 850 kr. í samanberingini við hini tilboðini.

Vektingin er, at tímaprísurin telur 50%, meðan tilgongd, førleikar og annað telur 50%. Tilgongd, førleikar og annað verður mett út frá “krøv og ynskir til ráðgevan” og “krøv til tilboð”.